

## Fundur um arbeiðsloysi í Kollafirði

Týsdagin 23. februar verður skipað fyri kunnandi fundi í Kollafirði um arbeiðsloysi og rættindum hjá arbeiðsleysum. Fundurin verður fyriskipaður í kjalarvørinum á stóra arbeiðsloysinum, ið hevur tikið seg upp um alt landið. Føroya Arbeiðarafelag og Arbeiðsloysisskipanin hava tikið stig til at hava kunnandi fundir fyri arbeiðsleys og onnur, sum vilja vita meir um arbeiðsloysisskipanina og hvørji fakfelagsrættindi arbeiðsleys hava. Umboð fyri arbeiðsloysisskipanina fara at greiða frá um rættindi, skyldur, skeiðsmøguleikar o.a. í arbeiðsloysisskipanini. Ingeborg Vinther forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag fer at greiða frá um tryggingar og annað viðkomandi, og umboð fyri Samtak verða við á fundinum. Fundurin verður kl 19 í húsunum hjá Kollafjarðar Arbeiðarafelag og er almennur. Fyrireikararnir vóna at fólk bæði úr kollafirði, men eisini grannabygdunum koma á fundin at kunna seg nærri um rættindi hjá arbeiðsleysum

# Fagraberg gjørt fimm túrar í ár

**- Eg haldi, at tað hevur gingið hampiliga væl hjá flestu pelagisku skipunum tað, ið farið er av hesum árinum, sigur Anfinn Olsen, reiðari, sum væntar, at Fagraberg nú fer á lodnuveiði í íslendskum sjógvi**



*Fagraberg fer nú á lodnuveiði undir Íslandi*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fagraberg, sum er fyrrverandi Krúnborg, hevur gjørt fimm túrar higartil í ár og reiðarin, Anfinn Olsen, letur væl at byrjanini av hesum árinum.

- Jú, vit eru nøgdir við hesa fyrstu tíðina av árinum í ár, og eg haldi, at pelagiski flotin sum heild hevur havt eina góða byrjan, sigur hann.

### Fimm túrar

Fagraberg kom á Havnina uppundir endan av seinastu viku.

Seinastu fýra túrarnar hevur skipið verið á sild og hava landað í Danmark og Noreg. Meginparturin av veiðini er farin til matna. Onkuntíð var so nógv sild á marknaðinum og onkur last fór til ídnað.

Anfinn Olsen, reiðari, sigur, at Fagraberg hevur gjørt fimm túrar tilsamans í ár, harav hin fyrsti var ein svartkjaftatúrur, har teir landaðu í Íslandi.

Reiðarin letur væl at gongdini higartil í ár.

- Eg haldi, at tað hevur gingið hampiliga væl hjá flestu pelagisku skipunum tað, ið farið er av hesum árinum.

### Á lodnuveiði

Anfinn Olsen sigur, at Fagraberg ætlandi fer á lodnuveiði í íslendskum sjógvi fyrsta dagin. Har eiga teir góð 1600 tons at fiska.

- Nú hevur sildin stór rogn, og tí loysir tað seg ikki so væl at fiska hana til matna í løtuni, sigur hann.

Reiðarin sigur, at meðan lodnuloyvini eru komin úr Fiskimálaráðnum, eru svartkjaftaloyvini ikki komin enn.

- Sum er, sleppa føroysku skipini ikki á svartkjaftaveiði. Hetta er tíðin, tá svartkjafturin er bestur og tíðin, sum nú kemur, er eisini hon, har hann er bíligastur at fiska, sigur hann.

### Vónar semju

Anfinn Olsen vísir á, at pelagiska vinnan nú roynir at finna semju um býtið av svartkjaftakvotuni, sum ávís ósemja hevur verið um.

- Eg haldi, at flestu feløg, sum hava pelagisk skip, eru fyri eginkvotu heldur enn felagskvotu, men trupult er at koma ásamt um júst, hvussu svartkjafturin skal býtast.

Reiðarin ásannar, at tað altíð er trupult, tá lítið er at býta, men hann sigur seg vóna, at vinnan semist, so nýggju loyvini kunnu útskrivast í næstum.

# Línuskip hava hampiligan fiskiskap undir Føroyum

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipini Kambur og Eystnes, sum hava roynt undir Føroyum, landaðu á Toftum fríggjadagin.

Kambur hevði 120.000 pund, og Eystnes 80.000 pund.

Meginparturin av veiðini hjá Kambi var longa og brosma, meðan stórur partur av veiðini hjá Eystnesi var toskur, hýsa og nakað av longu.

Trolbáturin Hansa Maria landaði eisini á Toftum fríggjadagin. Teir høvdu 24.000 pund, harav meginparturin av veiðini var havtaska.

Hansa Maria seldi fyri ein miðalprís, sum lá um góðar 20 krónur fyri kilo.

Í dag landar trolbáturin Búgvin á Toftum, men vit hava tíverri ikki fingið landingartølini hjá teimum.

# Miðalprísurin lá niðanfyri 10 krónur fyri kilo

**Miðalprísurin á Fiskamarknaði Føroya var lágur við søluna seinasta fríggjadag**

MARKNAÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ein orsøk til lága prísin á Fiskamarknaði Føroya seinasta fríggjadag var, at góð 44 tons vóru av gulllaksi, sum fóru fyri 5, 41 krónur fyri kilo. Hetta er ikki lágur gulllaksaprísur, men kortini hálar sølan av gulllaksinum miðalprísin niður.

Tað var ísfiskatrolarin Vestmenningur, sum er skrásettur at selja gulllaksin. Fiskurin er veiddur í mai mánaði í fjør. Gulllaksurin hevur ligið frystur, og verður nú helst útfluttur óvirkaður.

### Toskur og hýsa

Størstu einstøku nøgdirnar á marknaðinum fríggjadagin vóru annars toskur 3 og 4. Talan var um tilsamans 64 tons, sum fóru fyri ávikavist 13, 10 og 9,50 krónur í miðal fyri kilo.

Eini 30 tons vóru av hýsu, og besti miðalprísurin á hýsu var 11,10 krónur krónur fyri kilo.

30 tons vóru eisini av longu, og her var besti miðalprísur 11,14 krónur fyri kilo.



Fiskamarknaður Føroya seldi fríggjadagin tilsamans 206 tons fyri góðar 2 milliónir krónur.